gult cyan magenta svart






Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

# Frúgvin og Argjabáturin til Scilly

*Í fýra av teimum seks róðrunum á ólavsøku var longu greitt, hvør gjørdist føroyameistari, men kappingin um at sleppa til Silly Islands var enn ikki avgjørd, og tað vórðu Frúgvin og Argjabáturin, sum drógu longsta stráið*

STEFAN Í SKORINI

Undan ólavsøkuni vóru Frúgvin hjá kvinnum og Argjabáturin hjá monnum best fyri í Silly-kappingini, og tað eydnaðist eisini teimum báðum at tryggja sær luttøku í kappingini á Silly oyggjunum.

Hjá monnunum stóð kappingin millum Argjabátin og Vestmenning. Argjabáturin hevði 35 stig, meðan Vestmenningur hevði 28, so Argjabátinum tørvaði bara eitt stig. Argjabáturin vann, so har var einki ivamál.

Hjá kvinnunum var meira spennandi enn hjá monnunum. Har høvdu gentuurnar á Frúnni og kvinnurnar á Jarnbardi fult stigatal, men Frúgvin var frammanfyri, tí hon hevði størri mun niður til næsta bát. Um tveir bátar liggja javnir í stigum, so verður hugt eftir, hvussu langt teir liggja frammanfyri næsta bátin. Báðir bátarnir vunnu ólavsøkuróðurin, so manningin á Frúnni skal niður til Scilly oyggjarnar. Jarnbardur vann hesa kappingina í fjør, og hava tær verið har niðri fyrr í ár. Dreingjamanningin á Tjaldrinum skal í heyst luttaka í kappróðri á Sorø í Danmark.

**Einki óvæntað úrslit**

Eingin av vinnarunum á ólavsøku gjørdu áskoðararnar bilsnar, tí at allir vinnararnir lógu frammanundan fremst í FM-kappingini.

Støðan undan tí seinasta kappróðrinum á ólavsøku var tann, at heili fýra av teimum seks FM-heitunum longu vórðu avgjørd, har tann sami báturin hevði vunnið allar fimm róðrarnar.

Dreingirnir umborð á Tjaldrinum, genturnar á Frúnni, kvinnurnar á Jarnbardi og menninir á Argjabátinum høvdu øll tryggjað sær føroyameistaraheitið undan ólavsøkuni, men tey spardu ikki uppá krútið, tí at tað er altíð nakað serligt at vinna seinasta róðurin á ólavsøku. Kappingin um at sleppa til Silly oyggjarnar var heldur ikki avgjørd undan ólavsøkuni, og eisini tí var umráðandi at vinna seinasta róðurin.

Í 6-mannaførum hjá monnum og 10-mannaførum var enn spenningur um, hvør skuldi gerast føroyameistari. Strálan og Hvessingur høvdu 28 stig hvør undan róðrinum hjá 6-mannaførunum, og tað vóru strandingar, sum fóru avstað við FM-heitinum, meðan Hvessingur mátti taka annað plássið. Hjá 10-mannaførunum vann Vestmenningur ólavsøkuróðurin trygt, so at eingin ivi var um føroyameistaran.

Veðrið var hampuligt til kappróður. Allur teinurin kundi síggjast av keiini, meðan mjørkin allatíðina lá rundanum Havnina. Hugaligt var at síggja, at hetlendingar eisini høvdu sent eina manning til Føroyar at luttaka í ólavsøkuróðrinum, og kanska kann eitt samstarv kann spyrjast burturúr hesum.



*Hini 5-mannaførini máttu bara ásanna, at tað ongantíð skuldi eydnast teimum at fáa fatur á Frúnni*
***Mynd: Jens K. Vang***

# Breiddin lítil og spjaðingin stór

***Kappróður:*** *Eingi óvæntað úrslit vóru í ólavsøkuróðrinum, tá allir vinnararnir eisini gjørdust meistarar*

Um kappróður verður gjørdur upp í spenningi og óvæntaðum úrslitum, so kann ikki sigast annað, enn at flestu kappingarnar á ólavsøku vóru tannleysar. Í øllum róðrunum vunnu favorittarnir, og spenningurin var lítil ella eingin í teimum fýra kappingunum, har teir bátarnir, sum høvdu vunnið í teimum undanfarnu fimm kappingunum, eisini vunnu hesa ferð.

Tjaldrið við dreingjum, Jarnbardur við kvinnum, Frúgvin við gentum og Argjabáturin vóru so sannførandi hesa ferð, sum teir hava verið í undanfarnu róðrunum, og harvið fingu allar hesar manningarnar hægsta samlaða stigatalið, sum er 42.

Spenningurin var stórur undan róðrunum hjá 6–mannaførunum við monnum og 10–mannaførunum, og tær báðar kappingarnar vóru sera, sera spennandi. Strálan og Vestmenningurin vóru favorittar, og bæði strandingar og vestmenningar livdu upp til tað, sum frammanundan varð roknað við av teimum.

Tað plagar meiri enn so at koma fyri, at onkrir bátar vinna á ólavsøku, sum ikki vinna FM, men soleiðis var tað ikki hesa ferð. Tær somu seks manningarnar vunnu FM og tað, sum millum róðrarfólk við hvørt hoyrist nevnt lítla FM.

**Undanvindurin**

Kappróðrarárið fer ivaleyst at standa í kappróðrarsøguni sum eitt av teimum mest væl eydnaðu. Kanska er talan um besta róðrarárið nakrantíð. Tað eru ymiskir mátar at gera upp. Um vit meta út frá róðrarlíkindunum, so ber ikki til at ímynda sær, at líkindini skulu vera betri, enn tey hava verið á teimum seks stevnunum í hesum sjáldsama góða sumrinum.

Um vit meta út frá kærunum yvir róðrarnar, so hevur einki verið at hoyrt um tær, og okkum kunnugt hevur dómsnevndin verið púra arbeiðsleys. Og meta vit út frá tíðini, sum tað hevur tikið at fáa kappingarnar frá hondini, so hevur hon í ár verið styttri enn nakrantíð áður.

Róðrartíðin hongur m. a. saman við veðrinum og álitinum, sum róðrarfólkini hava á startdómarunum og høvuðsdómarunum.

Í ár hevur RSF roynt at bøtt um fasta startin, og øll tey, sum eru uppií kappróðrinum eru samd í, at talan hevur verið um eitt plettskot.

Eitt sindur av tosi var undan norðoyarstevnuni um mátini. RSF setti eina nevnd at gera álit um átini. Nevndin skal vera liðug við arbeiðið seinnni í ár, og ætlanin er at málið skal viðgerast á aðalfundinum, sum sambært ásetingunum fyri sambandið skal vera hildin áðrenn 1. november.

**Breiddin og spjaðingin**

Í samanumtøkuni av árinum og við framtíðini í huga kunnu kappróðrar áhugað fegnast um, at sigrarnir í róðrarárinum 2000 vórðu býttir út á seks ymisk feløg. Feløgini, sum vunnu, eru tey í Runavík, á Strondum, á Argjum, minna felagið í Havnini, í Vestmanna og so felagið í Miðvági.

At sigrarnir eru spjaddir kring stór øki av landinum eigur at hava íblástur til nýggjar avbjóðingar við sær í hesum økjunum. Og so er at vóna, at onnur øki, sum áður hava verið væl við, men sum ikki hava verið so dúglig í ár og undanfarin ár, fara at koma afturíaftur. Her verður t. d. hugsað um Norðoyggar, eystara partin av Eysturoy og Suðuroy.

Á hinari síðuni er tað harmuligt, at tættleikin og harvið intensiteturin ikki hevur verið størri í fleiri kappingum. At ein og sami bátur so at siga hevur vunnið, tá teir fyrstu eitt hundrað metrarnir eru lagdir afturum, kveikir ikki áhugan.

Ivaleyst fara nýggjar royndir at verða gjørdar fyri at fáa bilbukt við mest vinnandi bátunum. Onkrar manningar, sum eingin hevur staðið kurl í ár, fara nú at spjaðast, og nýggir ungdómar skulu royna seg. Í øðrum feløgum verður kjølurin strektur til nýggjar bátar. Vónin er, at teir skulu vera við í kappingini um fremstu plássini.

Hvussu tað fer at hilnast, fæst fyrsta ábendingin um, tá fyrsti FM kappróðurin í 2001 verður á skránni um mánaðarskiftið mai/juni.

JH

gult cyan magenta svart



# Frúgvin var best av øllum

*5-mannafør gentur: Fyri fyrstu ferð nakran tíð er ein miðvágsbátur við gentum FM-vinnari og vinnari á ólavsøku*

Frúgvin úr Miðvági við gentumanning er besti kappróðrarbáturin ár 2000. Stigatalvan vísti, at tær hva vunnið eins nógv, sum tríggjar aðrar manningar. Tí hevði nevndin, sum ger av, hvør skal vinna útvarpssteypið, tveir møguleikar. Annar var at kasta lut millum fýra manningar: Frúnna, Tjaldrið við dreingjamanning, Jarnbard við kvinnum og Argjabátin.

Hin møguleikin var at velja ein vinnara, tí hann hevði víst besta róðurin á ólavsøku. Tað tænir nevndini til sóma, at hon valdi seinna møguleikan, og at hon valdi genturnar á Frúnni sum bestu manningina.

**Ruddiligur sigur**

Ta var trongligt, tí fimtan gentumanningar vóru við í róðrinum. Tað gekk kortini væl at senda bátarnar avstað, men tá málið var knappliga hálvt rógvið, skeyt høvuðsdómarin róðurin av. Onkrir av aftaru bátunum høvdu róð saman.

Tær á Frúnni harmaðust, tí tá høvdu tær akkurát strítt seg fram á eitt trygt frysta pláss. Hvassi og Tjaldrið høvdu annars verið framvið á fyrstuetrunum.

- Men tað vísti seg ikki at bila. Tá vit fóru undir umróðurin høvdu vit eina góða kenslu av, at tað fór at bera okkum til at vinna, søgduær á Frúnni, tá tað var greitt, at tær høvdu vunnið alt, sum tað bar teimum til at vinna.

Hvassi, Tjaldrið, Ørnin, Drekin og Havfrúgvin vóru framvið í umróðrinum. Men eftir teir fyrstu 30 metrarnar var greitt, at teirra kapping bara var um næstfremsta plássið. Frúgvin var nógv fremst og nógv best.

**Søguligur sigur**

FM sigurin hjá nýggja 5-mannafarinum í Miðvági var tann fyrsti hjá einum gentubáti úr Miðvági nakrantíð.

Sambært okkara hagtølum var hetta eisini einasta ferðin, at ein gentubátur úr Miðvági hevur vunnið á ólavsøku. Miðvágsgentur hava annars verið við til at manna Ørnina úr Sandavági, sum hevur nógv undanfarnu árini.

Glæsiligu úrslitið hjá Frúnni gjørdu, at tað varð skipað fyri stórfingnari móttøku, tá báturin kom vestur, og tað var nú heldur ikki so undarligt.

JH



*Nógv steyp eru at halda skil á hjá teimum umborð á Frúnni. Tær hava vunnið tað, sum vinnast kann hetta róðrarárið*
***Mynd: Jens K. Vang***

# Endaliga støðan í FM

5-mannafør, dreingir

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 42 stig |
| 2 | Havfrúgvin | 29 stig |
| 3 | Kollur | 21 stig |
| 4 | Drekin | 20 stig |
| 5 | Spógvin | 9 stig |
| 6 | Royndin Fríða | 6 stig |
| 7 | Sílið | 5 stig |
| 8 | Junkarin | 1 stig |

6-mannafør, kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 42 stig |
| 2 | Hvessingur | 26 stig |
| 3 | Gongurólvur | 20 stig |
| 4 | Fuglfirðingur | 17 stig |
| 5 | Páll Fangi | 13 stig |
| 6 | Lómur | 9 stig |
| 7 | Sølmundur | 3 stig |
| 8 | Kollfirðingur | 1 stig |
| 9 | Riddarin | 1 stig |

5-mannafør, gentur

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 42 stig |
| 2 | Tjaldrið | 21 stig |
| 3 | Hvassið | 21 stig |
| 4 | Ørnin | 21 stig |
| 5 | Drekin | 15 stig |
| 6 | Havfrúgvin | 5 stig |
| 7 | Beinta | 5 stig |
| 8 | Sílið | 2 stig |

6-mannafør, menn

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Strálan | 35 stig |
| 2 | Hvessingur | 33 stig |
| 3 | Hósvíkingur | 19 stig |
| 4 | Kollfriðingur | 16 stig |
| 5 | Gongurólvur | 16 stig |
| 6 | Sølmundur | 7 stig |
| 7 | Snopprikkur | 2 stig |

8-mannafør

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 42 stig |
| 2 | Toftabáturin | 27 stig |
| 3 | Gullbrandur | 22 stig |
| 4 | Nevið Reyða | 20 stig |
| 5 | Húsavíkingur | 10 stig |
| 6 | Heiðabáturin | 6 stig |
| 7 | Miðvingur | 2 stig |
| 8 | Oyndri | 2 stig |
| 9 | Kvívíkingur | 1 stig |

10-mannafør

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vestmenningur | 36 stig |
| 2 | Nólsoyingur | 29 stig |
| 3 | Havnarbáturin | 28 stig |
| 4 | Eysturoyingur | 18 stig |
| 5 | Kjølur | 10 stig |
| 6 | Vágbingur | 7 stig |
| 7 | Klaksvíkingur | 1 stig |
| 8 | Suðringur | 1 stig |
| 9 | Vestmannabáturin | 1 stig |

## Úrslitini av ólavsøkuróðrinum

*Seinasti FM-róðurin í ár varð rógvin á ólavsøku. Niðanfyri prentað vit úrslitini úr ymsu róðrunum*

**5-mannafør, dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 4.40,12 |
| 2 | Havfrúgin | 4.46,15 |
| 3 | Drekin | 4.51,20 |
| 4 | Spogvin | |
| 5 | Kollur | |
| 6 | Sílið | |
| 7 | Blikur | |
| 8 | Royndin Fríða | |
| 9 | Báran | |
| 10 | Junkarin | |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 4.59,03 |
| 2 | Hvessingur | 5.03,00 |
| 3 | Lómur | 5.03,07 |
| 4 | Páll Fangi | |
| 5 | Gongurólvur | |
| 6 | Fuglfirðingur | |
| 7 | Riddarin | |
| 8 | Sølmundur | |

**5-mannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 4.59,05 |
| 2 | Tjaldrið | 5.06,10 |
| 3 | Hvassi | 5.07,11 |
| 4 | Ørnin | |
| 5 | Drekin | |
| 6 | Havfrúgvin | |
| 7 | Beinta | |
| 8 | Sílið | |
| 9 | Súlan | |
| 10 | Royndin Fríða | |
| 11 | Spógvin | |
| 12 | Blikur | |
| 13 | Bylgjan | |
| 14 | Junkarin | |
| 15 | Dúgvan | |

**6-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Strálan | 4.34,10 |
| 2 | Hvessingur | 4.35,08 |
| 3 | Hósvíkingur | 4.37,16 |
| 4 | Kollfirðingur | |
| 5 | Gongurólvur | |
| 6 | Snopprikkur | |
| 7 | Sølmundur | |

**8-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 4.24,01 |
| 2 | Gullbrandur | 4.27,10 |
| 3 | Heiðabáturin | 4.27,12 |
| 4 | Nevið Reyða | |
| 5 | Toftabáturin | |
| 6 | Húsvíkingur | |
| 7 | Miðvingur | |
| 8 | Víkarbáturin | |
| 9 | Oyndrið | |
| 10 | Kvívíkingur | |
| 11 | Ørvur | |
| 12 | Knørrur | |

**10-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vestmenningur | 4.06,18 |
| 2 | Havnarbáturin | 4.07,21 |
| 3 | Kjølur | 4.07,23 |
| 4 | Eysturoyingur | |
| 5 | Nólsoyingur | |
| 6 | Vágbingur | |